Ein nýggjur forsætis-ráðharri til Føroya

Hóast hann er nýggjur sum forsætisráðharri, so er hann rættiliga drúgvur í politikki

Anders Fogh Rasmussen hevur ikki sitið leingi í forsætisráðharrasessinum, men hann hevur drúgvar royndir í politikki

VITJAN
Heri á Rógvi

Eftir fólkatinsvalið 20. november gjørdist tað greitt, at ein nýggjur forsætisráðharrin skuldi setast í starv. Formaðurin fyri Venstre, Anders Fogh Rasmussen, varð stutt eftir valið tilnevndur forsætisráðharri.

Aðrastaðni á síðuni sæst, hvussu nakrir føroyskir politikarar hava uppliva Anders Fogh Rasmussen. Úttalilsini hjá teimum minna eisini ikki lítið um hvørt annað.

Um Anders Fogh Rasmussen er annars tað at siga, at hann varð borin í heim 26. januar 1953. Hann hevur tað mesta ungdómsárunum búð í einum býi tætt við Viborg, og er tað eisini har, at hann er valdur nakrir ferðir, hóast hann seinni er fluttur.

Forsætisráðharrin er útbúgvin cand.oecon (búskapur) frá lærda háskúlanum í Århus. Hann varð fyri fyrstu ferð valdur á fólkating í 1978, men hann hevur verið aktivur í Venstre longri enn so. Hann var á ungum árum kendur fyri síni ógvuliga liberalu sjónarmið, sum eisini koma fram í bókum hansara.

Í 1998 gjørdist hann formaður fyri tingbólkin hjá Venstre og seinni sama ár eisini formaður fyri flokkin.

Anders Fogh Rasmussen er giftur og eigur trý børn.

Jóannes Eidesgaard:

Veit hvat hann vil



– Tú verður ikki formaður í Venstre av ongum, sigur Jóannes Eidesgaard m.a. um Anders Fogh Rasmussen

VITJAN
Heri á Rógvi

– Tað, at ein nýggjur forsætisráðharri kemur til Føroya so skjótt aftaná, at hann er settur er ikki nakað nýtt, men tað undrar meg, at hevur fund við Sambandsflokkin og ikki Javnaðarflokkin, sigur Jóannes Eidesgaard, tá vit spyrja hann, hvat hann heldur um vitjanina hjá danska forsætisráðharranum í komandi viku.

Tað, at Anders Fogh Rasmussen bert heldur fund við Sambandsflokkin, heldur Jóannes Eidesgaard vera ótaktiskt.

Jóannes Eidesgaard fegnast eisini um, at Anders Fogh Rasmussen leggur upp til samstarv, men vit eiga ikki at missa málið av hesari orsøk, tí Anders Fogh er framvegis Anders Fogh, og hann hevur eisini bæði drúgvar royndir í politikki og kunnleika til føroysk viðurskift.

– Okkara sjónarmið skulu ikki vinnast yvirfyri Anders Fogh Rasmussen, men heldur yvirfyri tí føroyska fólkinum, men Anders Fogh Rasmussen skal vera hjartaliga vælkomin, og vit eisini at fáa eitt gott samstarv við hann, sigur Jóannes Eidesgaard.

Ávirkaður av Blaire

Jóannes Eidesgaard hevur sjálvur sitið á fólkatingi í fýra, tá Anders Fogh var leiðari fyri Venstre, og hann kennir eisini eitt sindur til nýggja danska forsætisráðharran.

– Anders Fogh er ein maður, sum veit, hvat hann vil. Tú verður heldur ikki formaður í Venstre av ongum, sigur Jóannes Eidesgaard.

Formaðurin í Javnaðarflokkinum greiðir víðari frá, at Anders Fogh er ógvuliga ávirkaður av Tony Blair og hansara hátti at føra valstríð og annað.

– Hann er ein ógvuliga modernaður polittikkari. Eg haldi nógv um tað, at hann ikki sjálvur tekur orðið oftani, men letur framsøgufólkinum sleppa framat, heldur Jóannes Eidesgaard.

Reint ideologiskt heldur Jóannes Eidesgaard, at hann mestur áður hevur verið meira liberalur enn hann er nú, men hetta er ofta soleiðis í politikki.

Edmund Joensen:

Ein modernaður politikari



– Anders er ein stórur politikari og ein øgiligur kapasitetur, sigur Edmund Joensen m.a. um Anders Fogh Rasmussen

VITJAN
Heri á Rógvi

Edmund Joensen er bæði fyrrverandi løgmaður og fyrrverandi formaður fyri Sambandsflokkin. Hann hevur eisini havt rættiliga nógv samskifti við Anders Fogh Rasmussen, sum eisini hevur verið í Føroyum fleiri ferðir.

– Anders er ein rættiligur arbeiðshestur. Hann er altíð væl fyrireikaður, og einki verður latið til tilvildina at ráða yvir, sigur Edmund Joensen.

Edmund Joensen heldur, at Anders Fogh Ramussen er ímyndin av einum modernaðum politikara, har bretski forsætisráðharrin, Tony Blair, hevur verið ein stór fyrimynd.

– Hann hevur staðið við liðina á fleiri stórum monnum í Venstre. Hann er frá einum yngri ættarliðið enn teir frammanundan, men hann verður ein av teimum heilt stóru í donskum politikki, og hetta verður ein perioda, ið Danmark fer at fáa nógv burturúr. heldur Edmund Joensen.

Fyrrverandi løgmaðurin sigur, at Venstre og Sambandsflokkurin altíð hava havt eitt sera gott samstarv og hetta heldur væntandi áfram. Ein ávísur munur er tó á flokkunum.

– Hann er ein rættiliga liberalur politikari. Fyrr var hann kanska meira liberalur. Nú leggur hann seg kanska meira eftir at gera flokkin breiðari, sigur Edmund Joensen.

Óli Breckman:

Kontantur maður

– Hann virkar nógv meira ektaður enn Nyrup, sigur Óli Breckman m.a. um Anders Fogh Rasmussen

VITJAN
Heri á Rógvi

Ein stóran part av teirri tíðini, ið Anders Fogh Rasmussen hevur sitið á fólkatingi hevur eisini Óli Breckman sitið á fólkatingi.

– Eg upplivi Anders Fogh Rasmussen sum ein sera ávmáldan persón. Hann sigur ikki tey nógvu óneyðugu orðini, og hann hevur altíð virkað sum um, at hann veit, hvat hann vil, sigur Óli Breckman.

Fyrrverandi fólkatingsmaðurin sigur, at hann altíð hevur kent Anders Fogh Rasmussen sum ein fryntligan og fyrikomandi mann, sum mann altíð kundi venda sær til.



– Hann er ein óalmindeliga kontantur maður. Hann kann eitt nú taka ein beinleiðis tíðindafund, har hann greitt meldar út, hvat hann heldur um ymiskt mál, sigur Óli Breckman.

Fyri Óla Breckman virkar tað oftani sum um, at nýggi forsætisráðharrin er strongdur. Hann metur heldur ikki Anders Fogh vera nakað størvegis prátingarsaman ella útatvendan, men hann er tó altíð bæði fólkaligur og fryntligur.

Á tí ideologiska økinum og í mun til sínar undangangarar – bæði forsætismálaráðharran og floksformann – heldur Óli Breckman Anders Fogh vera øðrvísi.

– Hann virkar nógv meira ektaður enn Poul Nyrup. Hann er harumframt eisini ideolog, og hann er so liberalur, sum hann yvirhøvur sleppur at vera. Í mun til Uffe Elleman Jensen, er hann nógv meira intensur. Tú hevur eisini kensluna av, at hann altíð veit, hvat hann gongur fyri seg, sigur Óli Breckman at enda.

Standmyndin farin at lukta av skomm

Norðoya Sparikassi lat fyri stívliga tveimum árum síðani Klaksvíkar kommunu standmynd av vinnulívsmanninum Kjølbro. Nú heldur tann, sum lat gávuna, at tað er farið at lukta av eini skomm

KJØLBRO
Eyðun Klakstein

Hetta er modell av standmyndini av Kjølbro, sum í langa tíð hevur bíðað eftir, at Klaksvíkar kommuna skal gera hóskandi økið klárt til hana. Hon verður krógvað í býráðshúsinum
Mynd: Jens Kristian Vang

Klaksvík: Tá Norðoya Sparikassi fyri góðum tveimum árum síðani helt 80 ára stovningardag sín, lat sparikassin Klaksvíkar kommunu eina standmynd av tiltikna vinnulívsmanninum Jógvan Fr. Kjølbro.

Ætlanin var, at Klaksvíkar kommuna skuldi finna hóskandi stað at seta standmyndina, sum síðani skuldi minna klaksvíkingar og vitjandi á stóra týdningin, sum virksemið hjá Kjølbro hevði fyri Klaksvík og Føroyar annars.

Men hóast meira enn tvey ár eru liðin, síðani hendan standmyndin var latin Klaksvíkar kommunu, hevur einki verið at sæð til hana.

Luktar av skomm

Hetta hevur fingið táverandi formannin í umsjónarráðnum hjá Norðoya Sparikassa at sóknast eftir gávuni.

Jógvan E. Joensen, sum sjálvur handaði Klaksvíkar kommunu gávuna, spyr í Norðlýsinum, hvussu tað ber til, at standmyndin av Kjølbro ikki er komin upp at standa.

– Meðan aðrir avdúka eina standmynd fyri og aðra eftir, kom standmyndin Kjølbro ongantíð upp at standa. Hví, spyr hann í einum lesarabrævi.

– Eg fái meg illa til at trúgva, at tað í Klaksvíkar býráði eru kreftir, sum ikki vilja kennast við sína søgu. Undanførsla um hóskandi stað heldur neyvan. Ongin sigur, at hetta økið skal vera stásiligt torg frá fyrsta degi, skrivar Jógvan E. Joensen.

Hann heldur, at tað hevði verið hóskandi at avdúka standmyndina á 115 ára degnum hjá Kjølbro, sum er 25 februar.

– Annars fer tað at lukta eitt sindur av einari skomm, at tað onki hendir í so langa tíð, og tað hugsi eg ikki, at klaksvíkingar vilja hava sitandi á sær, heldur fyrrverandi formaðurin í umsjónarráðnum hjá Norðoya Sparikassa.

Harmast gongdina

Borgarstjórin í Klaksvík, Steinbjørn Jacobsen, svarar í Norðlýsinum í gjár Jógvani E. Joensen.

Hann lovar, at Klaksvíkar kommuna skal fáa standmyndina upp at standa sum skjótast.

– Eg harmist um, at tað nú eru gingin góð tvey ár uttan at hendan virðiliga gáva hevur fingið tað pláss í býnum, sum hon hevur uppiborið, sigur Steinbjørn Jacobsen.

– Men eg kann vissa Jógvani E. Joensen og allar borgarar í kommununi um, at býráðið í næstum fer at fáa hetta mál til endaliga støðutakan, so standmyndin av hesum úrvals vinnulívsmanni kann fáa eitt hóskandi pláss í býi okkara.

Skal avgreiðast

Borgarstjórin í Klaksvík heldur, at ein orsøk til, at avdúkingin av standmyndini kom í drag var, at verkætlanin fyri økið, har standmyndin skal standa, var ov kostnaðarmikið, og ov lítil peningur var settur av til endamálið.

– Vit arbeiða við, at standmyndin skal standa á plássinum frammanfyri fyrsta handilin hjá Kjølbro á Biskupsstøð, og í næstum verður málið í næstum verður lagt fyri avvarðandi nevndir í býráðnum, so standmyndin kann avdúkast til várs, sigur Steinbjørn Jacobsen.

Sjálv standmyndin er langt síðani liðug og hevur í meira enn eitt ár staðið krógvað í býráðshúsinum í Klaksvík.

Har bíðar Kjølbro eftir at verða avdúkaður sum standmynd.

Býráðið kundi umhugsa politikkin

Formaður í sosialu nevnd hjá Klaksvíkar býráð heldur, at kommunan kundi umhugsa, um nakað skal broytast við raðfestingunum hjá býráðnum, nú fólkatalið minkaði farna árið

POLITIKKUR
Eyðun Klakstein

– Kanska kundi býráðið umhugsa tær priotiteringarnar, sum eru gjørdar. Eg sigi ikki, at nakað skal broytast við tí politikkinum, sum vit hava lagt, men um tað kann hava nakað gott við sær, so áttu vit tikið tað upp, heldur Eyðgunn Samuelsen, formaður í Sosialu nevnd hjá Klaksvíkar kommunu

Klaksvík: Fólkatalið í Klaksvík minkaði í 2001, hóast samlaða fólkatalið í Føroyum vaks við næstan 1000 fólkum, og øll hini størru plássini í landinum upplivdu vøkstur.

Formaðurin í sosialu nevnd hjá Klaksvíkar býráð heldur, at ansingarpláss og bústaðarmøguleikar hava stóran týdning, um fólk búseta seg í Klaksvík.

– Tað er neyðugt, at fólk kunnu fáa børnini ansað, og at tey hava møguleika at finna hús ella íbúð, um tey skulu búgva í Klaksvík. Tí skal kommunan syrgja fyri at útstykkja grundøki og eisini fáa fleiri ansingarpláss, sigur Eyðgunn Samuelsen, býráðslimur fyri Javnaðarflokkin.

– Tað gera vit eisini í 2002, men spurningurin er, um tað er nóg mikið til at venda gongdini.

– Tað fara nógvir pengar til vinnuligar útbyggingar í Klaksvík, men hesar eru eisini neyðugar. Vit gera eina góðshavn í Ánunum, og tað er nakað, sum hevur skund, nú vit fáa ein undirsjóvartunnil.

Bleytu virðini

Eyðgunn Samuelsen leggur tó dent á, at tey bleytu økini hava avgerandi týdning, um fólk skulu flyta til Klaksvíkar.

– Kanska brúkar kommunan pengar til ov nógv ymisk mál í senn, ístaðin fyri at loysa ein trupulleika upp á stutta tíð, men vit eru í eini sera truplari støðu. Nógvar íløgur bíða eftir at verða gjørdar, men tað er avmarkað, hvat vit kunnu klára, sigur Eyðgunn Samuelsen.

– Vit mangla ikki arbeiði í Klaksvík, tí er tað okkurt annað sum manglar í kommununi. Tað er umráðandi, at vit fáa fólk at støðast í býnum, og vit mugu eisini hugsa um tey bleytu virðini.

– Kanska kundi býráðið umhugsa tær raðfestingarnar, sum eru gjørdar. Eg sigi ikki, at nakað skal broytast við tí politikkinum, sum vit hava lagt, men um tað kann hava nakað gott við sær, so áttu vit at mett um raðfestingarnar av nýggjum, heldur Eyðgunn Samuelsen.

Pætur nummar 9

Lutakastið til danska Melodi Grand Prixið er gjørt, og tað hevði við sær, at føroyski finalisturin í kappingini, skal syngja sín sang næstsíðst.

10 sangir eru í finaluni, og sangurin, Som en drøm, hjá Pæturi verður nummar 9 í røðini.

Hetta verður vanliga mett sum eitt gott pláss, tí sangurin er feskur, tá dómurin skal fellast í kappingini.

Pætur ásannar tó, at tað týdningarmesta er, at sangurin verður væl framførdur. Nær hann verður spældur hevur minni týdning.

Og at framførslan verður góð, ætlar Pætur at tryggja sær við nógvum venjingum komandi tíðina. Tað verða eisini hildnir onkrar royndir, áðrenn sjálva finaluna, so Pætur og hini sleppa at venja seg við umstøðurnar, sum Grand Prixið fer fram í.

ek